Tórshavn, hin 04.februar 2010
Málnr.: 403-201000148-1

# HEILSUFRØÐILIGASTARVSSTOVAN

Útgáva 1
**Matvørudeildin**

# Vegleiðing til borðreiðing

**Endamál**
Borðreiðing av mati. Borðreiðingin kann vera í sethúsum ella øðrum hølum.

**Maturin**
Maturin, sum borðreitt verður við, skal koma frá einum góðkendum stað. Maturin skal flytast við røttum hita, kølivøra kaldari enn 5° C og heitur matur minst 65° C.

**Høli**
- Anrættingarrúm, sum ikki er privati køkurin
- Goymslumøguleikar
- Borðstova / stað
- Vesi og skiftistað til starvsfólki
- Kundavesi.

**Innrætting**
- Rúm skal vera til at anrætta matin í. Hetta rúmið skal ikki nýtast til annað virksemi í tíðarskeiðinum, sum matur verður útboðin.
- Hondvask við ikki hondstýrdum krana skal vera í anrættaringarrúminum.
- Nóg mikið av goymslumøguleikum skal vera.
- Tað skal vera nokk av køliplássi at goyma matin í.
- Reingerðaramboð og reingerðarevni skulu vera goymd burtur frá matvørum.
- Vesi skal vera, sum bert verður nýtt av starvsfólkinum, ið handfara matin. Eingin annar skal nýta hetta vesið í tíðarskeiðinum, sum matur verður útboðin.
- Eitt vesi skal vera til kundarnar, sum skal vera eitt annað vesi enn starvsfólkavesi. Tað kann vera eitt alment vesi, um tað liggur tætt hjá.

**Útbúnaður**
Hesin útbúnaður skal vera:
- Uppvaskieindin skal vera minst eitt vask og ein stór húsarhaldsuppvaskimaskina, sum vaskar við minst 65° C í langa tíð.
- Flótandi sápa, eingangshandklæði og ruskspann skulu vera við hondvøsk í køki og á vesinum.
- Borðbúnaður, sum verður nýttur, skal verða vaskaður í uppvaskimaskinu, áðrenn hann verður nýttur.

*Allur leysur útbúnaður, amboð o.a. skal hanga ella standa upp frá gólvinum, á hillum e.l., eisini reingerðaramboð.*

**Persónligt reinføri**
- Arbeiðsfólk skal bera hóskandi arbeiðsbúnað, sum skal vera reinur.
- Hóskandi stað skal vera at goyma rein arbeiðsklæði.
- Starvsfólkavesi skal ikki nýtast av húsfólki ella vitjandi.
- Skrivlig mannagongd skal vera fyri reingerð av anrættingarkøki, vesi o.a., sum tryggjar, at høli, útbúnaður og amboð eru rein hvønn arbeiðsdag.
- Reingerðarætlanin skal innihalda arbeiðsgongd til dagliga reingerð, og nær meiri umfatandi reingerð og sóttreinsing skal fara fram.

**Burturkastskipan**
- Burturkast skal beinast út úr hølunum eftir hvørt tiltak og beinast burtur á ein fullgóðan hátt samsvarandi kommunalu skipanini (KOB/IRF).

**Reingerð**
- Høli, útbúnaður og amboð skulu vera rein, tá ið matur verður útboðin.
- Anrættingarrúmið skal gerast reint eftir hvønn arbeiðsdag.

**Annað**
- Arbeiðast skal soleiðis, at trygd verður veitt fyri, at maturin borðreitt verður við ikki verður dálkaður av nærumhvørvinum.
- Royking er bannað á øllum støðum, har matur verður viðgjørdur ella goymdur.
- Vatnið, sum verður nýtt til at borðreiða við, skal hava drekkivatnsgóðsku.
- Um borðreitt verður við mjólk, skal hon vera hitaviðgjørd og koma frá MBM.

**Annað virksemi**
- Er ætlanin sjálvur at gera matin borðreiðast skal við, skulu hølislisviðurskiftini vera í samsvari við ætlanirnar.

Víst til aðrar vegleiðingar á www.hfs.fo.

Hetta eru vegleiðandi krøv til borðreiðing.
Mett verður um hølisviðurskiftini, og endalig avgerð verður tikin í hvørjum einstøkum føri.